# Kollvelting í álopinum

**Nýggjur álopsmaður: Lyngby framherjin, Christian Lamhauge Holst, sum er spildurnýtt navn í føroyskum fótbóltshøpi, verður royndur sum nýtt álopskrút í Skotlandi**

LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk*

Christian hvør?

Soleiðis mundu flestu leikararnir á fótbóltslandsliðnum hugsa, tá teir týsmorgunin fingu bræv um komandi fótbóltslandsdystirnar móti Skotlandi og Litava.

Niðast á listanum yvir leikarar stóð nevnliga eitt - í føroyskum fótbóltshøpi – púrasta ókent navn.

Talan er toppskjúttan hjá Lyngby, sum í løtuni er í ferð við at endurskapa navn sítt í donskum fótbólti, eftir at felagið fór á húsagang og eftirfylgjandi varð tvangsniðurflutt fyri hálvum øðrum ári síðani.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á Henrik Larsen ella Jógvan Martin Olsen, men aðrastaðni á síðuni er viðtala við nýggja leikaran.

### Eingin Hjalgrím

Stóri taparin – um tað kann sigast so – í landsliðsúttøkuni hesaferð er Hjalgrím Elttør. Hann hevur annars verið fastur í hópinum seinastu nógvu ferðirnar, og tó at tað sjáldan er blivið til eitt pláss millum teir fyrstu ellivu, so mundu tey flestu kortini rokna við, at hann eisini var við hesaferð. Tað er Tór-Ingar Akselsen úr HB heldur ikki, eftir at hann fyri fyrstu ferð fekk landsliðsboð til Íslandsdystin.

Umframt teir átjan, sum eru tiknir út til Skotandsferðina, hevur Christian Høgni Jacobsen úr Vejle eisini fingið landsliðsboð. Christian Høgni er tó leikbannaður til dystin í Skotlandi, og verður tí ikki við á teirri ferðini, men legst ístaðin afturat hópinum til heimadystin móti Litava. So fer tíðin at vísa, hvørt tað tá verður neyðugt hjá venjarunum at sálda onkran frá, ella um forfall av onkrum slag kortini fer at skerja hópin.

### Kollvelt álop

Hvussu er og ikki, so tykist tað víst, at talan verður um broytingar í álopspartinum.

Christian Høgni Jacobsen fær so í øllum førum ikki verið við, nú hann er leikbannaður, og tað er nærliggjandi at hugsa, at John Petersen verður fluttur upp í hansara stað, nú Fróði Benjaminsen aftur er tøkur á miðvøllinum. Spurningurin er so, hvørt tað verður Andrew av Fløtum ella onkur annar, sum so verður undir liðini á John. Her hevur áður verið funnist at, at Andrew og John eru ov líkir í spælistíli, og tí kann væl hugsast, at talan verður nýggja leikaran.

## Føroyski hópurin

| | |
|---|---|
| Jens Martin Knudsen, | NSÍ |
| Helgi L. Petersen, | NSÍ |
| Fróði Benjaminsen, | B68 |
| Jann Ingi Petersen, | B68 |
| Hans Fróði Hansen, | B68 |
| Jóhannis Joensen, | FS Vágar |
| Jákup á Borg, | B36 |
| John Petersen, | B36 |
| Pól Thorsteinsson, | B36 |
| Súni Olsen, | GÍ |
| Atli Danielsen, | KÍ |
| Rógvi Jacobsen, | HB |
| Andrew av Fløtum, | HB |
| Óli Johannesen, | TB |
| Jákup Mikkelsen, | Partich Thistle |
| Jón Rói Jacobsen, | Brøndby |
| Julian Johnsson, | ÍA Akranes |
| Christian Lamhauge Holst, | Lyngby BK |
| Henrik Larsen, | venjari |
| Jógvan Martin Olsen, | hjálparvenjari |
| Lars Høgh, | málmansvenjari |
| Birgir Hansen, | liðleiðari |
| Kári Nielsen, | liðleiðari |
| Álvur Hansen, | fysioterapeutur |
| Jens Pauli Marstein, | lækni |

# – Hetta kom óvart á meg

**– Fyri nøkrum fáum døgum síðani hevði eg ikki droymt um, at eg skuldi spæla landsdyst ímóti Skotlandi í september, sigur nýggja trumfkortið á føroyska fótbóltslandsliðnum**

TIKIN Á BÓLI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað munnu vera fáir føroyingar, sum hava givið sær far um navnið Christian Lamhauge Holst.

Í øllum førum til nú.

Men hetta verður øðrvísi komandi dagarnar, tí í gjár var hálvi føroyingurin tikin út til føroyska fótbóltslandsliðið, og meðan spælarar og onnur standa sum kánus, tá ið tey hoyra navnið á nýggja landsliðsspælaranum, so er okkurt sum bendir á, at her er talan um góðan styrk til álopsspælið á landsliðnum.

Christian Holst Lamhauge er 21 ára gamal álopsspælari. Í summar skifti hann frá Svendborg, har hann var toppskjútti, til 2. deildarfelagið Lyngby, har nú er toppskjútti.

Hann er ein maður, sum dugir at gera mál, men hann sigur seg vera fullkomnan tiknan á bóli av úttøkuni til føroyska landsliðið.

– Eg havi hitt Henrik Larsen í Lyngby, og tað eru bara einar tvær vikur síðani, at hann fekk at vita, eg eri hálvur føroyingur. Leygardagin ringdi hann til mín og segði, at hann kom at hyggja eftir mær í dystinum sunnudagin, greiðir Christian Lamhauge Holst frá.

### Fantastiskt

Sunnudagin spældi Lyngby ímóti Dalum, og Christian Holst lat ongan iva vera um sína støðu, tá ið hann tíðliga í dystinum legði Lyngby fram um 1-0.

Hetta var triðja málið hjá honum í trimum dystum fyri Lyngby, og sambært heimasíðuni hjá felagnum, so var nýggi føroyski landsliðsspælarin aftur hesaferð eyðsýntur á liðnum. Lyngby vann dystin 3-2.

– Sunudagin ringdi Henrik Larsen aftur til mín og segði, at hann fór at taka meg út til føroyska landsliðið. Hetta kemur óvart á meg, men tað er fantastiskt, sigur hann.

– Tað hevur gingið sera skjótt seinastu tíðina. Eg eri júst komin til Lyngby at spæla, og nú eri eg úttikin til føroyska landsliðið. Hetta er spennandi, og eg ætli mær at gera alt fyri at vinna fast pláss á føroyska landsliðnum.




*– Sunnudagin ringdi Henrik Larsen til mín og segði, at hann fór at taka meg út til føroyska landsliðið. Hetta kemur óvart á meg, men tað er fantastiskt, sigur Christian Lamhauge Holst*

### Gott at breða til

Mamma Christian Lamhauge Holst er føroysk, men hon hevur búð uttanlands, síðani hon var 18 ára gomul. Berghild Lamhauge, sum er gift einum dana, er dóttir Jenny og Christian Eli Lamhauge í Havn.

Mammubeiggi nýggja føroyska landsliðsspælaran er ein tiltikin fótbóltsspælari. Eyðfinn Lamhauge var ein av profilunum á unglingaliðnum hjá HB, sum vann FM í 1967, og árið eftir kom hann á fyrsta sinni á 1. lið í HB. Eyðfinn var skilagóður spælari, sum spældi í vinstru síðu, og hann var ein av berandi kreftunum á HB-liðnum, sum vann FM í 1971, 1973, 1974 og 1975.

Christian Holst Lamhauge hevur búð øll árini í Danmark, og hann tosar danskt. Hann er uppvaksin á Thurø, sum liggur uttanfyri Svendborg, og har hevur hann eisini spælt til í summar, tá ið hann flutti til Sælands at spæla fyri Lyngby.

Yrkisfótbólturin í Lyngby fór fyri bakka fyri einum ári síðani, og tí eru eingir sáttmálaspælarar í felagnum. Christian Holst er vikarur í einum skúla og frítíðarheimi í Lyngby, og hann spælir fótbólt í frítíðini.

Og í fótbóltsspælinum gongur tað so væl, at hann nú er tikin út til føroyska landsliðið til dystin ímóti Skotlandi 6. september.



# Flóvin umboðar Føroyar



*Flóvin Tór Næs skal umboða Føroyar í kappingini um norðurlandameistaraskapin*

**Norðurlandameistaraskapurin í talvi verður leiktur 6-17. septembur í Århus. Flóvin Tór Næs er føroyska umboðið, eftir at John Arni Nilssen mátti geva avboð**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í samband við at DSU (danska talvsambandið) fyllur 100 ár, verður NM telvað á flatlondum í ár. Legendan Bent Larsen, sum nú er vorðin 68 ár, verður frásøgumaður til kappingina, soleiðis at áhugaði kunna fylgja gondini í øðrum høli við fyrsta danska stórmeistaranum sum høvuðsnavn. Larsen er kendur fyri gjøllar, lættar og skemtingarsamar frásøgur um ymisku talvini.

Telvað verður í døgunum 6-17. septembur. Tólv telvarar og ellivu umfør, allir móti øllum.

Fremsti norðurlendingur í løtuni, danin Peter Heine Nielsen (2636), luttekur ikki. Sterkasti norðmaður, Simen Agdestein (2571) er ikki, eins og fremsti íslendingurin Jóhan Hjartason (2640), serliga aktivir meira og luttekur tí ikki.

Einar Gausel er hinvegin eitt spennandi navn. Hann fer nevnliga komandi vetur at telva við føroyska talvfelagnum í Keypmannahavn, har hann kemur at manna fyrsta borðið framanfyri John Arna Nilssen á øðrum borði.

### Flóvin kann bíta frá sær

Tá okkara fremsti telvari John Arni gav avboð, varð skjótt boð send eftir 25 ára gamla Flóvin Tór Næs. Hetta var ein nátúrlig avgerð hjá talvsambandinum, eftirsum Flóvin er suvirent tann næsti í røðini í føroyskari telving, tá rating viðvíkur. Á feskasta ratinglista, sum er at finna á www.faroechess.com, hevur John Arni 2425, meðan Flóvin hevur 2329. Tann triði á listanum er føroyameistarin Martin Poulsen við 2265 ratingstigum.

Flóvin hevur í summar sum altíð verið aktivur við talvborðið, hesaferð í Politiken Cup í Keypmannahavn við góðum úrsliti. Hann fer sjálvsagt at fáa tað torført sum lægst rataði í Århus. Allir vilja vinna á honum, og fær Flóvin tí til dømis ongan skjótan javnleik, um hann ynskir at spara seg, sum vanligt er í drúgvum kappingum. Men Flóvin hevur dygdir sum treiskleika, tol og eisini er hann eftirhondini ein royndur telvari, hóast unga aldurin. Mangan hevur Flóvin fingið góð úrslit móti væl sterkari telvarum, harav stórmeistarum.

### Normmøguleikar

Ífylgju altjóða talvdómaranum Mogens Nielsen, sum er vælkendur á føroyskum leiðum, er IM-norm kravið hjá Flóvini 4,5 stig av ellivu møguligum. Hetta ljóðar kanska í fyrstu syftu sum ein yvirkomilig uppgáva hjá Flóvini, men vit muga ikki gloyma mótstøðu hansara; sjey stórmeistarar, tríggir altjóða meistarar og einum Fidemeistara (FM), sum tað kallast.

Føroyska umboðið skal sum sagt í eldin 6. septembur, og herfrá verður ynskt honum góðar talvdagar í Århus.

**NM-hópurin:**

| | | |
|---|---|---|
| GM Hannes Stefansson | 2560, | Ísland |
| GM Helgi Olafsson | 2498, | Ísland |
| GM Evgeni Agrest | 2605, | Svøríki |
| GM Jonny Hector | 2538, | Svøríki |
| GM Einar Gausel | 2533, | Noreg |
| IM Kjetil A. Lie | 2440, | Noreg |
| IM Tomi Nybäck | 2483, | Finnland |
| FM Heikki Lehtinen | 2362, | Finnland |
| FM Flóvin Tór Næs | 2330, | Føroyar |
| GM Curt Hansen | 2618, | Danmark |
| GM Lars Schandorff | 2525, | Danmark |
| IM Davor Palo | 2510, | Danmark |

## Talvið hesa vikuna

John Arni vann herfyri sum kunnugt sær sín næsta IM-norm í kapping í Budapest, og talvið hesa vikuna er frá næstseinasta umfarinum. John Arni vann IM-kappingina saman við ungum amerikumanni, Lendermann.

John Arni Nilssen (2382) — Amadeus Eisenbeiser (2233)
First Saturday Chess Tournament IM Budapest (12), 13.08.2003

1.d4 d6 2.e4 Rif6 3.Bd3 g6 4.c3 Ribd7 5.Rif3 e5 6.0—0 Bg7 7.Re1 0—0 8.a4 c6 9.a5 Re8 10.Ribd2 d5 (Áhugaverdur leikur, sum brýtur upp sentrummið) 11.exd5 Rixd5 12.Rie4! (Riddarin peikar á góðar puntar) 12...exd4 13.cxd4 h6 14.Bd2 (John Arni tykist at bíða eftir feilum frá mótstøðumanninum. Næsti leikur mótstøðumanna er kanska júst ein lítil feilur, sum viknar um kongastøðuna) 14...f5 15.Rid6 Rxe1+ 16.Fxe1 Ri7f6 17.Ric4 Bd7 18.a6! (Leikurin viknar enn meir um svørtu støðuna) 18...b5 19.Rice5 Be8 20.Fc1 (Betri var 20.Rixd6 Bxd6 21.Fe6+ og offraði brikkurin fæst aftur) 20...Fb6? Í roynd og veru fyrsti veruligi feilur hjá svørtum. Rig4 var kanska bjargingin til javnleik, hóast hvítur tá eisini hevði havt munin) 21.Bxh6 Rib4



Støðan eftir 22...Rib4

22.Bxf5! Kh7 [Um: 22...gxf5 23.Bxg7 Kxg7 24.Fg5+ og hvítur vinnur lættliga] 23.Bxg7 Kxg7 24.Bxg6 (Svartur gavst t.d vegna 24...Bxg6 25.Fg5 og hvítur hevur eitt nú nógv fleiri finnir) 1—0

# Jón Rói tvey mál

**Føroyski miðverjin vísti sannførandi avrik, tá ið teir næstbestu í Brøndby vunnu stórt á Roskilde**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Sunnudagin var Jón Rói Jacobsen á næstbesta liðnum hjá Brøndby. Liðið, sum bara er mannað við ungum og sera evnaríkum spælarum, er í Danmarksseriuni. Hesa ferð var Roskilde mótstøðuliðið, og tað var eingin trupulleiki. Eftir 5–0 í fyrra hálvleiki vann Brøndby 7–0. Jón Rói Jacobsen skoraði tey bæði málini í 2. hálvleiki.

Í landsdystinum ímóti Íslandi vísti Jón Rói, at hann er sera væl fyri. Hann var besti føroyski spælarin, og tá ið hann í 2. hálvleiki fleiri ferðir bjóðaði seg fram í álopspartinum, kendist tað so leikandi lætt og sannførandi. At havt hann í álopinum hevði ivaleyst borið ta tyngdina við sær, sum hevur restað tær seinastu ferðirnar.

Í Brøndby er Jón Rói Jacobsen verjuspælari. Hann venur saman við besta liðnum, og tað er torført hjá honum at sleppa upp í part á besta liðnum, tí teir eru so nógvir um boðið. Men Jón Rói tykist hava akkurát tann hugburðin, sum skal til, og tað man lítið ella einki vera at ivast í, at tað bara er ein spurningur um tíð, nær hann verður við í fremstu røð uttanlands.

Í annaðkvøld fer Brøndby í UEFA CUP at spæla í Hvítarusslandi ímóti Dinamo Minsk. Tað skal vilja heilt illa til, um Brøndby ikki fer at megna at spæla seg víðari í næsta umfarið. Á heimavølli vunnu teir fyri tveimum vikum síðani 3–0.

Brøndby dysturin verður at síggja á TV Danmark 1 sjónvarpsrásini.